## Zakaris í Snarskivuni

**Hósdagin kl. 16 letur listamaðurin Zakaris Heinesen upp framsýning í forhøllini í Snarskivuni á Vaglinum**

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*

Í gamla posthúsinum í miðbýnum húsast umframt postavgreiðslu eisini Snarskivan. Rúmsátta, ljósa og hugnaliga forhøllin verður eisini brúkt sum framsýningarhøli, har mong listafólk hava havt framsýning, síðani Snarskivan læt upp fyri nøkrum árum síðani.

Endamálið við hesum framsýningarhøli hjá mentamáladeildini er at sameina kommunala tænastu og listaskála, har listin hittir borgaran á alfaravegi, og nú upp undir jól verður forhøllin so karmur um eina listaframsýning hjá Zakarisi Heinesen.

Til hesa framsýning, ið er ein sølutframsýning, hevur Zakaris arbeitt við vatnlitsmyndum.

# Trøllapætur í Miðlahúsinum



*Enn er ikki heilt víst, um omman kemur við. Men Trøllapætur lovar, at hann nokk skal koma til Havnar onkursvegna*

**Leygardagin verður Trøllapætur í Miðlahúsinum í Vágsbotni, har hann fer at draga vinnararnar av stóru kappingini við Kulum Rótum**

KAPPING
*Jákup Mørk*

Seinastu seks vikurnar hava Sosialurin og Kular Røtur skipað fyri kapping. Lepar hava verið í bløðunum tvær ferðir um vikuna hesa tíðina, og við at senda hesar inn, ber til at taka lut í stóru kappingini. Høvuðsvinningurin er einki minni enn ein familjuferð fyri tvey vaksin og tvey børn við Atlantic Airways, og hartil er talan eisini um hópin av øðrum góðum vinningum. bæði við bókum og fløgum frá Kulum Rótum og Trøllapæturi.

Leygardagin skulu teir 31 vinnararnir so finnast, og tað verður Trøllapætur, sum kemur í Miðlahúsið at vita, hvør hevur vunnið. Hartil verða Nósi og Kular Røtur eisini at síggja, og møguleiki er eisini fyri, at Trøllaomman kemur til Havnar.

Hon hevur annars úr at gera, nú hon skal baka pannukøkur og annað gott til jóla, men Trøllapætur hevur biðið hana um at koma til Havnar við sær, tí hann torir so illa avstað einsamallur.

Tiltakið í Miðlahúsinum verður kl. 14 leygardagin, og tá kunnu øll børn - stór sum smá - leggja leiðina framvið.




JAKKU HEINESEN, EIRIKUR HOFGAARD,
UNNUR JENSEN, SIGGA Í GARÐASTOVU
Tannlæknamiðstøðin · Óðinshædd 1

REPROZ

MÓTTØKA

Móttøka verður fríggjadagin 25. november kl. 16–19 á nýggju tannlæknamiðstøðini á Óðinshædd 1. Øll eru hjartaliga vælkomin.


# Nýggj barnafløga

**Bestu songrøddirnar frá Nósabarnaprix'num koma nú á gøtuna við fløguútgávu**

FLØGUÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*

Nú kunnu øll børn og tey vaksnu við, gleða seg, tí nú kemur nevniliga ein nýggj barnafløgu at standa á søluhillunum í handlum kring landið. Longu fríggjadagin ber til at ogna sær fløguna, sum stutt og greitt eitur "Barnafløgan 2005"

Tað eru børnini sum luttóku í finaluna Nosabarnaprix 2005 sum hava verið í upptøkustudio og sungið tey spildur nýggju føroysku barnasangirnar sum eru á fløguni.

Tað sum er serstakt við hesi útgávu er, at løgini eru nýmótans pop og R&B tónleikur, tvs. at løgini ikki eru gjørd á sama hátt sum vit vanliga seta í samband við barnaløg. Hóast tað, so eru tekstirnir kortini skrivaðir til børn. So tað ger, at hon er sera spennandi at lurta eftir.

Umframt lagið "Eg eri Nósi" er eisini eitt nýtt Nósalag við á fløguni, tað lagið ber heiti "Her hjá tær." Tað er Laila Carlsen sum syngur hetta lagið. Eisini eru tvey karaokeløg við á fløguni.

Tað eru tilsamans (við karaokeløgunum) 10 løg á fløguni og sum áður nevnt er at fáa til keyps nú. Fríggjadagin fæst "Barnafløgan 2005" til keyps í 3´aranum í SMS, men longu týsdagin í næstu viku fæst hon eisini til keyps í søluбúðum kring landið. Fløgan kostar kr. kr.129,-


ÁRNI WINTHER ARKITEKTAR



Vit sóknast eftir einum Arkitekti og einum Byggifrøðingi

Skrivlig umsókn.

Niels Winthersgøta 4 | FO-100 Tórshavn
Tel. 31 41 90 | Faks 31 41 97
awinther@awinther.fo | www.awinther.fo

REPROZ